**Anna á Váli:**

# Frá glaðing til fartelefon

**Sum tað sæst í okkara frásøgn frá Jakku á Sundi hevur nógv samband verið millum Sund og Norðradal. Pápi Jakku var jú upprunaliga haðani, og nógv samband var millum bygdirnar. FF-blaðið hevði í 2003 ein samrøðu við Onnu á Váli, sum er uppvaksin í Norðradali og hevur hon sum fá upplivað broytingarnar í farnu øld. Millum annað hevur hon upplivað glaðing. Vit endurgeva hesa ferð og í komandi bløðum part av frásøgnini hjá Onnu saman við ískoyti, sum vit nú hava fingið frá Onnu**



*Her er Anna á Norðradalsskarði næstseinasta sunnudag. Bygdin sæst niðri við sjóvarmálan, og beint yvirav Norðradal liggur Koltur, hagar Anna hevur verið við til at glaða!*

Anna er fødd 5. november í 1920 og er tískil 86 ára gomul. Men sera skilagóð er hon, og tey eru ikki mong, sum hava roynt so nógv at tí gamla bygdalívinum sum hon. Vit halda tað vera sera týdningarmikið at fáa fest lívsroyndir hjá fólki sum Onnu á blað, so hesar kunnu varðveitast fyri eftirtíðina.

Foreldrini hjá Onnu vóru Katrina Simonsen og Óli Reinert, sum bæði vóru ættað úr Norðradali, men tey búðu í Tróndargøtu í Havn.

Tey vóru seks systkin, Hanna, Hans, Nele, Oleva, Símin, og so var ein genta inn ímillum, sum doyði heilt lítil.

Mamman doyði, tá ið yngsta barnið bert var tveir mánaðir gamalt. Sagt var, at hon hevði fingið lungnabruna, sum ikki var óvanligt hjá barnakonum, um tær komu í kulda stutt eftir føðingina. Hetta var áðrenn pensillinið var uppfunnið, og sjálvt lungnabruni kundi vera deyðilig sjúka. Katrina kom á sjúkrahúsið, men kom ikki livandi heim aftur. Hon doyði tó so knappliga, at Anna heldur, at hon má hava fingið blóðtøpp ella líknandi. Hetta hendi í 1924, tá ið Anna var 4 ára gomul.

Sjálvt um Anna var so ung, tá ið hon fór úr Havnini, hevur hon kortini onkur minni frá síni tíð sum havnargenta. Og hetta var frá jólunum, tá ið hon var trý ára gomul. Tá skipaði jarðarmóðurin Hansina, kona Tummas í Fjósi, fyri jólahaldi fyri børnum, sum hon metti ikki at vera so væl fyri. Hetta minnist Anna sum eina ógloymandi hending.



*Í Norðradali í 1927.*
*Børnini eru frá vinstru: Jóhanna Apol, Agnar Reinert, Anna Reinert (á Váli) og Eiko Apol. Í hjólbøruni Jákup Apol og Elma Reinert (Olsen).*

### Leidd til Norðradals

Tað var sjálvsagt ikki lætt hjá einum einsamallum pápa at sita eftir við einum so stórum barnaflokki. So ráðini vóru, sum var tað vanliga tá í tíðini, at børnini fóru til skyldfólk at vera. Øll børnini uttan tveir av dreingjunum fóru til onnur at vaksa upp. So tað varð avrátt, at Oleva og Anna skuldu fara til Norðradals at vera. Á jólum fóru tískil pápin saman við Dia gubba, Andreas Samuelsen, bakara, í Horni, til Norðradals við báðum systrunum. Teir leiddu Onnu millum sín, meðan Oleva varð borin í leypi.

Hetta var sjálvsagt ein stór broyting at fara úr Havnini til Norðradals, og Anna minnist, at hon græt, tá ið hon sá Stiðjafjall, tí tað sá so ógvusligt út. Oleva fór til ommuna og abban á Fløtum at vera. Anna fór í fyrsta umfari til Símun mammubeiggjan og konu hansara Dortheu, sum var úr Kollafirði. Tey áttu frammanundan sjey børn.

Dorthea skuldi fara til Kollafjarðar at vitja várið eftir, at Anna var komin. Hon hevði tríggjar døtur við. Tískil vóru fleiri børn, sum pápin skuldi ansa, eftir í húsinum.

Dorthea man hava hildið hetta at verið ríkiligt fyri pápan, so hon spurdi Óla Reinert, sum var systkinabarn pápa Onnu, og konu hansara Josefinu, um Anna kundi vera har, til hon kom aftur. Og tað var leyst og liðugt. Har búði eisini pápi Óla, Andrias, og fastir Óla, Lotta, sum vanliga varð kallað gumma. Hjá teimum kom eg at vera verðandi.

### Ongin telefon

Telefon kom á Sund longu í 1906, sum áður greitt frá. Telefonin kom nógv seinni til Norðradal. Anna var umleið 10 ár tá, so hetta hevur verið umleið 1930. Hetta var sera forkunnugt, og gamla Lotta, gumma, hevði hug at ræðast hetta framstig, sum eingin kundi skilja.

Andrias í Norðradali var við til at leggja linjurnar. Hann skilti hetta heldur ikki og spurdi um træðrirnir vóru opnir innan!

Linjan til Norðradal gekk upp frá Kaldbaksbotni, og tað var so bratt, at linjan í støðum kom heilt niður ímóti svørðinum. Hetta var so spennandi fyri ein veðr, at hann fór at baksast við linjuna. So ella so gjørdist hann fastur, soleiðis at hann fór á glið, meðan hornini hingu á linjuni. Ein kvøld í skýming kemur Albert í Norðradali til gongu og hyggur upp. Tá heldur hann seg síggja ein mann hanga í telefonlinjuni, og skundaði sær at fara til hjálpar. Men tá var tað veðrurin, sum hekk deyður!

Ein dagin er Andrea, fastur Jakku, í telefonini úr Danmark, hon vildi eisini heilsa uppá gummu. Hon var einki við uppá hetta, men lat sær siga. Gumma tekur telefonina og hoyrir eina rødd siga: »Góðan dag gumma, hetta er Andrea.« Gumma er ræðslusligin og svarar aftur: »Oy Jesus Andrea, hvar ert tú?« Og so blakaði hon hornið frá sær , so her varð ikki meira prátað. Onkur annar mátti so taka hornið og halda fram við samrøðuni.

Óli Reinert og Jákup Bærentsen, bóndi á Sundi, vóru so sera væl. Jákup var tann fyrri til at fáa sær radio. Jakku minnist eisini tá ið Jákup kom berandi við radionum á bakinum.

Jákup visti, hvat dámdi Óla best at hoyra. Hetta kundi vera andaligt tilfar sum til dømis sálmasangur. Telefonstøð var á bóndagarðinum á Sundi, so tá ið okkurt slíkt var at hoyra, ringdi Jákup til Norðradals og legði hornið at radionum. Í Norðradali høvdu tey hátalara í telefonini, so tá kundi alt húsið lurta eftir hesum vakra tónleiki.

Telefonin varð eisini brúkt til eina serliga uppgávu, sum betri enn nakað annað vísir menningina í samskiftismøguleikunum í Annusa og Jakkusa tíð. Tá ið grindaboð vóru, varð ringt til støðina í Norðradali. Tá var uppgávan hjá teimum at glaða boðini víðari til Kolturs, har eingin telefon var komin. Glaðast kundi í trimum ymiskum støðum niðri á bakkanum. Tað sást á staðnum har glaðað var, hvar grindin var. Glaðingin fór fram við at brenna gamalt hoyggj. Tað kundi saktans vera eitt sindur vátt, tí tá gjørdist meira av royki, og boðini sóust betri í Koltri.

So tey gomlu hava upplivað allar samskiftishættir frá glaðing til barnabørnini, ið nú hava fartelefon og teldu, sum ger tað møguligt hjá teimum at koma í samband við allan heimin eftir sekundum.

Her skal leggjast afturat, at áðrenn tey fingu telefon í Norðradali, plagdi Jákup úr bóndahúsinum á Sundi at renna til Norðradals við grindaboðum. Tá hann kom á Norðradalsskarð rópti hann so hart hann orkaði grindaboð, og hetta hoyrdist í bygdini, so tey fingu rigga seg til, áðrenn Jákup kom oman í bygdina og greiddi frá, hvar grindin var.

Sosialurin